

*Sambandsflokkurin ella Alfred átti at sagt veruleikan sum hann var. Eitt ivamál elvir til gitingar í fjølmiðlunum - í hesum føri við tí úrsliti, at bæði Sambandsflokkurin og Alfred Olsen vera til láturs, heldur miðlafrøðingurin Allan Dalsgarð*

## Miðlafrøðingur um Sambandsflokkin:

# Ein taktiskur brølari

**– Útmeldingarnar frá Alfred Olsen og Sambandsflokkinum eru tekin um vantandi fjølmiðlastrategi, sigur miðlafrøðingurin Allan Dalsgarð, sum heldur, at flokkurin hevur dugað illa at handfara fjølmiðlarnar**

**POLITIKKUR**
*Finnur Jensen*
*finnur@sosialurin.fo*

– Tann, ið dugir best at handfara fjølmiðlarnar, klárar seg oftast best.

Tað sigur Alan Dalsgarð, miðlafrøðingur, sum metir, at Sambandsflokkurin hevur dugað illa í handfaringina av málinum um Alfred Olsen.

Miðlafrøðingurin vísir á, at óvissan viðvíkjandi Alfred er ein taktiskur brølari frá báðum pørtum.

- Tað er týdningarmikið - serliga í politikki - at hava greiðar útmeldingar óansæð, um hon er negativ ella positiv. Ein politikkari, sum t.d. tekur eina avgerð aftur ella møguliga enntá heldur tær loyniligar fyri fjølmiðlunum, so missir hann trúvirðið, sigur Allan Dalsgarð, sum sipar til avgerðina hjá Sambandsflokkinum tók í gjár, men sum hvørki Alfred Olsen ella Kaj Leo Johannesen vilja koma út við.

– Útmeldingarnar frá Alfred Olsen og Sambandsflokkinum eru tekin um vantandi fjølmiðlastrategi. Sambandsflokkurin ella Alfred átti at sagt veruleikan sum hann var. Eitt ivamál elvir til gitingar í fjølmiðlunum - í hesum føri við tí úrsliti, at bæði Sambandsflokkurin og Alfred Olsen vera til láturs, sigur Allan Dalsgarð

### Tjóðveldisflokkurin dugdi væl

Miðlafrøðingurin vísir á, at málið um Karsten Hansen var eitt dømi um góða miðlastrategi.

- Hóast útmeldingin var negativ, so var hon greið. Hann tók eina avgerð og helt fast um hana. Og tað vísir seg nú, at flokkurin ikki misti nakað av orrustuni, heldur tvørtur ímóti, sigur Alan Dalsgarð og vísir á góða úrslitið, sum Tjóðveldisflokkurin fær í nýggju veljarakanningini.

Eitt annað gott dømi er veljarakanningin, sum Tjóðveldisflokkurin í fjør sjálvur lat gera.

– Hóast fleiri settu spurnartekin við trúvirði av kanningini, fekk hon góða umrøðu í fjølmiðlunum. Her var talan um eitt gott mediestunt, sigur Allan Dalsgarð.


## ÁRSINS KJAKVIRÐISLØN 2006

Aftur í ár verður ársins kjakvirðisløn latin. Miðlahúsið hevur tikið stig til hesa virðisløn, sum verður latin einum persóni, felag, felagsskapi ella stovni, sum hevur givið sítt góða íkast til at fremja samfelagsliga kjakið, ið er ein av grundarsteinunum undir fólkaræðinum.

Endamálið við at lata hesa virðisløn er eisini at menna og stimbra almenna orðaskiftið og gera tað meira fólksligt, professionelt og náttúrligt. Í fjør fekk Óli Petersen, teknari, virðislønina fyri við sínum tekningum og viðmerkingum at geva sítt góða íkast til samfelagsorðaskiftið.

Lesarar kunnu senda okkum uppskot til ársins kjakvirðisløn við at fylla út lepan og senda hann til Miðlahúsið, Tórsgøta 1, 100 Tórshavn, ella tit brúka teldupostadressu okkara post@sosialurin.fo. Setið frámerki á: »Ársins kjakvirðisløn«.

**Freistin at lata inn uppskot er mánadagin 12. februar.**

Avdúkingin av ársins kjakvirðisløn fyri 2006 verður á samkomu í Miðlahúsinum hósdagin 15. februar kl. 16.00

Ein dómsnevnd við Jón Brian Hvidtfeldt, útvarpsmanni, Karin Kjølbro, leiðara á Kriminalforsorgini, Jóannesi Dalsgaard, deildarleiðara í Mentamálaráðnum, og Annleyg Lamhauge, deildarleiðara á Menningastovuni, ger av, hvør fær virðislønina




FØROYA BANKI

miðlahúsið í Vágsbotni




Uppskot: ____________________

Grundgeving: ____________________

Navn: ____________________

Bústaður: ____________________

Bygd / býur: ____________________

Telefon: ____________________

MIÐLAHÚSIÐ · TÓRSGØTA 1 · BOKS 76 · FO-110 TÓRSHAVN · POST@SOSIALURIN.FO